## Grønlendingar í málneyð

Nógvir grønlendingar, sum fara til Danmarkar, hava ilt við at skilja tað danska mkálið og at tosa tað, og tað kann mangan vísa seg at vera sera óheppið og heldur ikki sørt vandaleyst. Britta Gjelstrup, sum er leiðari á verkstaðnum Oqqumut í Esbjerg, sigur við blaðið JydskeVestkysten, at grønlendingar, sum skulu tosa við ein málsviðgera ella ein lækna í Danmark, eiga at hava rætt til at hava tulk hjástaddan. Britta Gjelstrup ásannar, at hetta hendir ikki ofta, men vísir á, at tað kann hava sera óhepnar avleiðingar, at partarnir ikki skilja hvør annan.






*Í Kina eru vatnlitsmyndir úr náttúruni og úr gerandisdegnum vælumtóktar*



*Litfagrir prýðislutir verða hildnir at geva eydnu, langt lív og framburð*

# Kina myndir á Glyvrum

Nú mentanin er í hásæti á Runavíkarleiðini, hevur 37 ára gamla Yan Jingrui úr Beijing í Kina framsýning við málningum í blómuhandlinum Orkis á Glyvrum. Tá Yan Jingrui hoyrdi, at mentan skuldi á breddan í heimbygdini, bjóðaði hon sær til at vísa føroyingum dømi um kinesiska mentan við málningum sínum. Í mun til í Føroyum, har oljumálningar eru vanligir, eru vatnlitir vanligari í Kina.

Yan Jingrui hevur búð á Glyvrum seinasti fýra árini, tí hon giftist føroyskum manni. Hon hevur onga veruliga listaútbúgving, men hevur lært at mála í frítíðini, tá ið hon búði í Kina. Tá Yan Jingrui ikki málar, siglir hon við Norrønu í summarhálvuni og arbeiðir í fiski um veturin.

Yan Jingrui hevur áður havt framsýning í Føroyum, í býráðshøllini í Runavík í 2006 og á tveimum Lions Club framsýningum: Í Eysturoynni á vári í 2007 og í Müllers Pakkúsi í Havn á Ólavsøku í 2008.

Framsýningin í Orkis er opin til 26. oktober, tá handilin er opin. Yan Jingrui sjálvt er at hitta millum kl. 11 og 13 allar dagarnar.




*Tá Yan Jingrui hoyrdi, at mentan skuldi á breddan í heimliga umhvørvinum, bjóðaði hon sær til at vísa føroyingum dømi um kinesiska mentan við málningum sínum*



*Orkis hevur prýtt framsýningarhølið við blómum og lutum úr handlinum*